## Regina Baltica í sigling í dag

Í dag fer Regina Baltica í sigling fyri Smyril, sum fer í dokk.

Síðsti túrur hjá Smyril var í dag kl. 13 av Havnini. Regina Baltica fer fyrsta túrin úr Vági til Havnar í dag klokkan 15:30. Strandferðslan sigur, at Bygdaleiðir í Suðuroy koyra í sambandi við fráferðina. Síðani verður siglt eftir kunngjørdu ferðaætlan.

Smyril kemur væntandi aftur í sigling umleið hálvan oktober.

## Sandingar vælnøgdir

Avgerðin hjá Sands Kommunu at stovna frítíðarskúla, hevur fingið góða undirtøku í fólkinum.

Tað sigur kommunan í síni heimasíðu.

Fyri at frítíðarskúlin skuldi halda fram, var treytin, at minst seks børn tóku av tilboðnum.

Men nú ein mánaði er farin av skúlaárinum, eru níggju børn meldað til skipanina.

Kommunan sigur, at tey lata væl at skúlanum og tað verður eisini gjørt nógv burtur úr. Eitt nú hava børnini bæði verið í Skúgvi og í biograf í Havn.

Í løtuni fyrireika børnini í frítíðarskúlanum sjónleik saman við børnum, sum fara í skúla næsta ár og tað verður næsta ár, at tey fara at spæla leikin.

## Ferðsluóhapp í Hvannasundstunlinum

Umleið klokkan 13.45 fyrradagin hendi eitt ferðsluóhapp í Hvannasundstunlinum. Ein persónbilur við tveimum fólkum rendi í tunnilsveggin. Annar persónurin í bilinum, ein kvinna, varð flutt á sjúkrahús. Neyðugt var at stongja tunnilin, sum tó lat upp aftur góðan tíma seinni.



**KANNING**

*Talið á roykjarum er minkað niður á 24%. Í fjør var tali 29%*

# Talið av roykjarum lækkar

**HEILSA** Ein gallupkanning fyri Fólkaheilsuráðið vísir, at færri føroyingar eru likamliga óvirknir og færri roykja

Eirikur Lindenskov

Gallup hevur fyri Fólkaheilsuráðið spurt 528 føroyingar um lívsvanar. Fólk vórðu eitt nú spurd um royking, um tey íðka ítrótt, og um tey eta frukt og grønmeti. Hetta eru tilvildarliga vald fólk 15 ár og eldri.

– Tað gleðiliga er nú hent, at talið av dagligum roykjarum er fallið niður á 24%. Hetta talið hevur verið hægri, soleiðis var tað í 2009 heilt uppi á 29%. Hend er eisini tann broyting, at nú er tað yvirvág av kvinnum, sum roykja, nevniliga 25% av kvinnunum og 22% av monnunum. Hyggja vit upp á aldursbólkarnar, eru tað bert 15% av teimum heilt ungu ímillum 15 og 24 ár, ið roykja hvønn dag. Flest roykjarar eru millum teirra, ið eru ímillum 25 og 39 ára gomul. 40% av teimum, sum spurd vóru, søgdu seg hava roykt áður, men eru givin. Hetta er áleið sama tal sum undanfarin ár, sigur Fólkaheilsuráðið.

BMI ella BodyMassIndex, altso vektin í mun til hæddina vísir, at støðan er áleið tann sama sum undanfarin ár, nevniliga at 39% hava eitt BMI ímillum 25 og 30 og 12% yvir 30, tað vit rópa ávíkavist yvirvektig og feit.

Viðvíkjandi likamsvirkni er at siga, at talið á teimum, sum ongantíð íðka ítrótt ella venja likamliga er fallandi. Í 2007 vóru hesi 37%, og nú eru tey bert 23%, ið siga, at tey eru púra óvirkin. Parturin av teimum, sum eru likamsvirkin í ítrótti ella øðrum likamsvenjingum fýra ferðir um vikuna ella meira er vaksandi. Í 2010 siga 2/3 at tey íðka ítrótt ella likamsvenjingar av øðrum slag meira enn eina ferð um vikuna.

64% siga seg eta frukt fýra ferðir um vikuna ella meira. Umleið helvtin etur grønmeti, annað enn eplir, meira enn 4 ferðir um vikuna. 16% eta fisk 4 ferðir um vikuna ella meira. Samlað siga fólk, at tey eta í meðal 225 g av frukt og grønmeti um dagin. Hetta er áleið tað sama sum undanfarin ár, men hetta er tó minni enn mælt verður til í tilmælinum hjá danska heilsustýrinum, sum sigur 600 g av frukt og grønmeti um dagin.

**» 25% av kvinnum roykja 22% av monnum roykja**

**» 64% eta frukt fýrar ferðir um vikuna ella meira**

# Lærurikar eygleiðingar

Í heyst verður Savnsfagnaðurin á teimum fýra stóru søvnunum í Havn: Náttúrugripasavninum, Sjósavninum, Listasavninum og Fornminnissavninum. Í fjør vóru samanlagt 3500 vitjanir á øllum søvnunum í heystfrítíðini. Gott 1000 skúlabørn vitjaðu í skúlavikuni, og bæði lærarar og næmingar vóru sera væl nøgd.



*Evnið á Savnsfagnaðinum í ár er eygleiðing*

Almenningurin sleppur at vitja søvnini í heystfrítíðini, og í viku 42 eiga skúlarnir tíð frá 18. til 22. oktober. Tað eru aftur hesa ferð 4., 5. og 6. flokkarnir, sum høvuðsdenturin verður lagdur á í skúlavikuni. Tá ið flokkarnir koma at vitja framsýningarnar, fáa teir rundvísing, og uppgávur verða at loysa bæði sum flokkar og sum einstaklingar. Evnið í ár er eygleiðing.

# Andras er solistur

Andras Olsen er solistur, tá Føroya Symfoniorkestur leygarkvøldið framførir nýggja verkið hjá Atla K Petersen »Im Memoriam.«

Stóra konsertin á tónleikafestivalinum Framrás verður leygarkvøldið 18. september klokkan 19:30, tá Føroya Symfoniorkestur hevur konsert í Norðurlandahúsininum.

Á skránni er ein fjøllbroytt skrá, norsk fólkaløg úr Hardanger, sum Geirr Tveitt hevur skrivað, 7. symfoni hjá Antonin Dvorak og nýskrivaða verkið hjá Atla K Petersen Im Memorian.

Atli Petersen er virkin sum tónasklad. Hann hevur skrivað verk fyri harmoniorkestur, hornorkestur, big band, symfoniorkestur, kór, solo ljóðøri og fleiri kamartónleikaverk.

Atli sigur um nýggja verkið In Memorian, at hetta er ein heilsan til tey, sum eru farin framvið í lívinum og ikki eru her longur.

Trombonleikarin Andras Olsen er solistur í Im Memorian. Andras hevur útbúgving frá Kongaliga Musikkonservatorinum í Keypmannahavn og starvast í løtuni hjá Kongaligu Lívgarduni.

Tað verður norski dirigenturin Trond Husebø sum fer at stjórna Føroya Symfoniorkstrið leygarkvøldið.

Konsertin við Føroya Symfoniorkstri verður í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið klokkan 19.30



*Andras Olsen*